# Mugu ikki slaka í málinum um útlendsk ítróttarfólk í Føroyum

**Føroya Arbeiðarafelag heldur, at kjakið um útlendsk ítróttarfólk í Føroyum, er farið heilt av sporinum**

ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tað kann ikki vera meiningin, at útlendsk arbeiðsfólk verða tikin framum arbeiðsleysar føroyingar, men tað er heilt vanligt, sigur Ingeborg Vinther. Myndin er tilvildarlig*

– Nú má landsstýrið ikki slaka meiri í málinum um útlendsk ítróttarfólk í Føroyum.

Tað sigur Ingeborg Vinther.

Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at tey kundu góðtaka treytirnar, sum innlendismálaráðið hevði sett føroysku feløgunum fyri at fáa útendsk ítróttarfólk at spæla.

Treytirnar vóru, at feløgini skulu sjálvi betala útlendsku ítróttarfólkunum 52% av eini arbeiðaraløn. Restina, 48%, kunnu tey forvinna hjá øðrum arbeiðsgevarum.

– Hetta var ein áseting, sum vit kundu góðtaka, sigur Ingeborg Vinther.

Men nú vísir tað seg, at landsstýrið er framvegis undir hørðum trýsti fyri at linka treytirnar, so at ítróttarfeløgini sleppa bíligari og so at útlendsk ítróttarfólk í størri mun kunnu hava vanligt arbeiði afturat ítróttinum.

Men Ingeborg Vinther sigur, at nú kann ikki slakast meiri.

– Eg vóni ikki at landsstýrið fer at slaka meiri tí so var líka frægt at tað als onki gjørdi men bara læt standa til, sigur hon.

Hon sigur, at fer landsstýrið at slaka meir, verður Føroya Arbeiðarafelag noytt til at taka málið upp av nýggjum.

## Farið heilt av sporinum

Annars heldur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, at spurningurin um útlendsk ítróttarfólk í Føroyum, er farið heilt av sporinum.

– Eg skilji onki av málinum longur, tí nú er tað farið at snúgva seg um nakað heilt annað enn tað sum tað í veruleikanum snýr seg um, sigur hon.

– Hetta snýr seg ikki bara um rættindini hjá føroyskum ítróttarfeløgum at fáa útlendskar leikarar.

– Hetta snýr seg sanniliga eisini um, at útlendingar taka arbeiði frá arbeiðsleysum føroyingum og tað kann ikki bera til.

Og í allarstørsta mun er talan um vanligt, tímalønt arbeiði.

– Tað er arbeiðsloysi í Føroyum og tað kann ikki bera til, at útlendsk ítróttarfólk skulu fáa arbeiði framum arbeiðsleysar føroyingar.

Ingeborg Vinther sigur, at tey hava nógv dømi um, at útlendsk ítróttarfólk fáa arbeiði á føroyskum virkjum framum føroyingar, sum sostatt mugu ganga arbeiðsleysir.

– Tað skerst altso ikki burtur, at í mongum førum hava útlendsk ítróttarfólk størri rættindi á føroyska arbeiðsmarknaðinum enn føroyingar hava. Teir verða bidnir til arbeiðis framum føroyingar og kunnu fara úr arbeiði til venjingar og til dyst, akkurát, sum teimum lystir. Samnstundis góðtekur arbeiðsgevarin ikki, at føroyingar ikki kunnu arbeiða yvir av ymsum orsøkum, kanska tí at tey mugu vera heima hjá børnum.

Tað hevur Føroya Arbeiðarafelag ein hóp av klagum um.

– Tað er ikki av ongum, at vit hava reist málið, sigur hon.

Ingeborg Vinther sigur, at hetta kann ikki vera meiningin, samstundis sum einir 1.400 føroysk arbeiðsfólk ganga heilt ella partvís arbeiðsleys.

– Tað var hetta, sum vit heitti á landsstýrið um at fáa skil á, og onki annað!

## Ómøguligt við sakligum kjaki

Hinvegin heldur hon eisini, at tað vísir seg at vera heilt ómøguligt at fáa eitt sakligt orðaskifti um hesi viðurskiftini.

– Tey, sum hava dittað sær at muta ímóti hesum óskilinum og vilja hava greið viðurskifti á økinum, verða skýrd rasistar og tað, sum verri er, enntá landsstýrismaðurin sjálvur.

– Undir slíkum treytum ber ikki til at hava eitt sakligt orðaskifti.

Men Ingeborg Vinther heldur fast um, at Føroya Arbeiðarafelag vil hava skil á hesum viðurskiftunum og verður landsstýrið trýst til at slaka meir, fer felagið at taka málið uppaftur, tí so endar alt aftur í sama óskilinum og tað vil Føroya Arbeiðarafelag ikki góðtaka.

# Fiskimenn og veiðimenn á ársfund í Føroyum

**Leygardagin heldur Verka- og Veiðimannafylkingin í Norðuratlantshavi ársfund í Føroyum**

ÀRSFUNDUR
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Ingeborg Vinther umboðar Føroyar í samskiftisnevndini í Verka- og Veiðimannafylkingini í Norðuratlantshavi*

Leygardagin verður ársfundurin hjá felagsskapinum hjá fiski- og veiðimonnum í útnorði.

Hesuferð verður fundurin á hotellinum á Eiði.

Tað er Verka- og veiðimannafylkingin í Norðuratlantshavi, stytt VM, sum talan er um.

Hetta er felagsskapur, har fiski- og veiðimenn í Føroyum, Ìslandi og Grønlandi eru limir.

Í Føroyum eru Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Fiskimannafelag og Føroya Handverkarafelag, limir.

Dagliga verður felagsskapurin stýrdur av eini samskiftisnevnd við einum umboði úr hvørjum landi og í seinastuni er tað Ingeborg Vinther, forkvinna á Føroya Arbeiðarafelag, sum hevur umboðað Føroyar í nevndini.

Men á ársfundinum eru fleiri umboð enn so við úr hvørjum landið. Á ársfundinum eru Føroyar umboðaðar við fýra umboðum frá Føroya Arbeiðarafelag, trimum umboðum fyri Føroya Fiskimannafelag og trimum umboðum fyri Føroya Handverkarafelag. Úr Íslandi koma fimm umboð og úr Grønlandi koma trý við á ársfundin.

À ársfundinum er ætlanin at tosa um felags viðurskifti og har fara umboðini úr teimum ymsu londunum eisini at greiða hinum londunum frá støðuni á arbeiðsmarknaðinum í teimum einstøku londunum.

Ein stórur partur av fundinum snýr seg eyðsæð um fiskivinnuna, tí hon hevur alstóran týdning í øllum trimum londunum.



# Tað er dýrari at egna línurnar

**Tá ið teir, sum selja agn til línuflotan, fingu nýggja sending av høgguslokki fyrr í ár, reyk prísurin úr 10 krónum fyri kilo, upp í 16 krónur. Hækkaði prísurin hevur ført til, at skipini egna minni av høgguslokki nú enn áður**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Orsøkin til, at vit hava so lítið av høgguslokki við, er partvís, at hann er so dýrur, og haraftrat hava teir heldur ikki latið so væl at honum, sigur Torleif Sigurðsson, reiðari*

Tá ið útboðið minkar, hækkar prísurin.

Tað er hetta, sum er galdandi fyri høgguslokkin, sum fyri 3-4 mánaðum síðan fór úr umleið 10 krónum fyri kilo upp í 16 krónur fyri kilo. Hetta er ein stór øking í prísi hjá einum flota, sum hevur havt minkandi inntøkur orsakað av nógv slakari fiskiskapi og lægri fiskaprísum.

Í Klaksvík, har nógv línuskip eru, keypa fleiri agnið hjá P/F Kambi á Strondum, meðan aðrir keypa agnið hjá P/F Kósini.

Torleif Sigurðsson, sum er reiðari á línuskipunum, Pison og Kvikki, sigur, at teir keypa agnið á Kósini, tí hann heldur, at hetta fyri teir er praktiskari.

Hann sigur tó, at P/F Kambur er ein góður, støðugur og álitisfullur útvegari av agni, sum hevur eina góða tænastu.

## Minni útboð

Torleif sigur, at útboðið av høgguslokki í ár hevur verið lítið, tí fiskiskapurin eftir høgguslokki við Falklandsoyggjarnar hevur svikið. Sostatt var høgguslokkur vorðin ein mangulvøra.

– Sum vit hava skilt, hevur tað verið torført hjá útvegarum at fingið fatur á høgguslokki, og tá ið nýggj sending kom fyri einum 3-4 mánaðum síðan, fór prísurin upp við einum seks krónum fyri kilo, úr umleið 10 krónum upp í 16!

P/F Kambur fekk fyrr hendur á høgguslokki enn Kósin, sum ikki altíð hevur havt høgguslokk á goymslu.

Hann sigur, at P/F Kambur hevur skamtað søluna av høgguslokki, tá ið goymslan var minkandi, soleiðis at skipini ikki altíð fingu tað, tey bóðu um.

– Hetta gjørdu teir fyri at fáa høgguslokkin at røkka, sigur hann.

Sum skilst á Torleifi, hevur Kósin eitt nú keypt sild og makrel frá Norðborg.

– Men Kósin hevur leingi ongan høgguslokk havt, til felagið nú fekk hendur á høgguslokki aftur. Í fyrsta lagi fingu teir 100 tons og skuldu síðan fáa 100 tons aftrat, men eg haldi ikki, at tey seinnu 100 tonsini eru komin.

Reiðarin ásannar, at tað er P/F Kambur, sum hevur tryggjað línuflotanum agn. Teir hava skipaði viðurskifti og hava verið trúfastir sum útvegarar av agni.

– Nú Kambur fyrst fekk nýggjan høgguslokk og seinni Kósin, fór prísurin uppá 16 krónur fyri kilo, sigur hann.

Torleif sigur, at tann smái høgguslokkurin roynist drúgvari enn hin stóri, og hann hevur skilt, at høgguslokkurin hjá Kósini er smærri enn tann, ið Kambur selir í løtuni.

## 6-7 tons av agni

Reiðarin veit at siga, at ein línubátur brúkar eini 6-7 tons av agni til ein vanligan línutúr, sum er einar 8-9 setur, og tað svarar til einar 50.000 krónur.

– Skipini, eg eri reiðari á, hava egnt ógvuliga lítið av høgguslokki í summar, men tey hava altíð høgguslokk umborð.

Hann heldur, at Pison og Kvikk í seinastuni hava havt minni enn eitt tons av høgguslokki við, tá ið tey byrja nýggjan túr.

– Orsøkin til, at vit hava so lítið av høgguslokki við, er partvís, at hann er so dýrur, og haraftrat hava teir heldur ikki latið so væl at honum.

Reiðarin sigur, at Pison og Kvik mest egna makrel og nakað av sild.

– Tá ið makrelurin er passaligur í stødd, verður hann klovin, og tá er hann eisini drúgvari, sigur Torleif Sigurðsson.

# Nú er nóg mikið av høgguslokki

**– Høgguslokkavertíðin royndist illa seinasta vetur. Lítið var at fáa, og bátarnir royndu til langt út á várið. Vit keypa agn í kapping við eitt nú skipini, sum veiða tunfisk, og tá ið kappingin gjørdist so stór, reyk prísurin eisini upp, siga tey á P/F Kambi á Strondum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Høgguslokkavertíðin vignaðist illa síðsta vetur, og tí gjørdist agnið so dýrt, tá ið ein nýggj sending kom*

Fyrr í ár noyddist P/F Kambur at boða skipum og bátum, sum regluliga keypa agn á Strondum, frá, at høgguslokkurin var farin at ganga undan.

– Vit lótu skip og bátar vita, at neyðugt fór at vera at skamta høgguslokkin fyri at fáa hann at røkka, til høgguslokkur fekst aftur. Alternativið var at gera sum aðrir og selja, til agnið var uppi. Tá høvdu teir, sum fiska væl, keypt størstu nøgdirnar, meðan aðrir høvdu verið fyri vanbýti, siga tey á Kambi.

## Vignaðist illa

Tá ið felagið aftur fekk nýggja sending av høgguslokki umleið hálvan mai, var hesin vorðin nógv dýrari at keypa, tí veiðan eftir høgguslokki vignaðist so illa seinasta vetur.

– Agnið er nú dýrari, men hinvegin vænta vit, at nóg mikið verður av høgguslokki restina av hesum árinum.

Á Kambi siga tey, at høgguslokkavertíðin við Falklandsoyggjarnar royndist illa seinasta vetur.

– Veiðan er vanliga í desember, januar og februar, men við tað, at so lítið var at fáa, dróg vertíðin út, soleiðis at roynt varð heilt út í apríl mánaða.

Hetta førdi til, at long tíð gekk, áðrenn Kambur fekk nýggja sending av høgguslokki.

– Vit keypa agn í kapping við eitt nú skipini, sum veiða tunfisk, og tá ið kappingin um høgguslokkin gjørdist so stór, reyk prísurin eisini upp, siga tey á Strondum.

## Størri høgguslokkur

Spurdur, um høgguslokkurin ikki er størri í ár, tá ið vertíðin við Falklandsoyggjarnar gjørdist so long, siga tey:

– Jú, hann er størri, enn hann hevur verið seinastu árini. Onkur stødd er so mikið stór, at til ber at klúgva høgguslokkin í tvey, soleiðis at hann verður drúgvari. Men samstundis verður eisini meira arbeiði av honum.

Á Strondum siga tey, at orsøkin til vánaliga fiskiskapin við Falklandsoyggjarnar síðsta vetur var, at streymviðurskiftini háttaðu sær øðrvísi enn vanligt, og tí rak yngulið samstundis øðrvísi enn vanligt.

P/F Kambur á Strondum selir høgguslokk, makrel, sild, kúfisk og nebbasild.